## Sylla til Hvidovre

Amed Davy Sylla skal komandi hálva árið hjálpa Hvidovre, sum spælir í næstbestu donsku deildini. Tað skrivar heimasíðan bold.dk. Sylla hevur seinasta hálva árið verið knýttur at FC Amager, men nú felagið fór á húsagang kundi hann skifta ókeypis. Og Hvidovre, sum eisini hevur føroyska Jónas Tór Næs í hópinum, tók av møguleikanum. Einans loyvið frá danska Fótbóltssambandinum, DBU, manglar, og tað kemur væntandi í rættlag fyrsta dagin. 26 ára gamli Amed Davy Sylla hevur áður millum annað spæla við ÍF, B36 og Birkirkara av Malta.



## Fyrst best av tveimum

Tá hondbóltsfinalurnar verða spældar, verður spælt best av trimum. Hetta merkir tó, at tað í fyrsta umfar verður spælt best av tveimum, og hevur annað liðið tá fleiri stig, verður triði dysturin ikki spældur. Endar annar dysturin javnur, kann støðan í stigum jú vera 3-1 til liðið, sum hevur vunnið hin dystin, men hóast tað tá framvegis er møguligt at javna til 3-3 í stigum, verður triði dysturin kortini ikki spældur, staðfesta reglurnar hjá Hondbóltssambandinum.

# Tjaldur sum Stjørnuskot

**Í teimum tilsamans fimm dystunum millum Stjørnuna og Tjaldur í vetur hevur verið sera javnt teirra millum. Stjørnan hevur samanlagt havt munin, men tó bara tepurt**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Óansæð, hvussu tað spælir av í FM-finalunum komandi dagarnar, kann staðfestast, at Tjaldur hevur verið stóra stjørnuskotið í hondbóltinum í vetur. Liðið vann í fjør 1. deild og spælir nú finalu í Sunset-kappingini ímóti Stjørnuni, sum síðstu tvey árini hevur verið meistari og eisini er trífaldur steypavinnari.

Men hóast sera ymiskt útgangsstøði, hava liðini sum heild verið jøvn. Í landskappingini hava tey vunnið tvær ferðir í part á hvørjum øðrum, og samlaði málmunurin er 101-100 til Stjørnuna, sum haraftrat vann við tveimum málum á Tjaldri í steypafinaluni í ár.

Hvussu verður í finalunum, er sjálvandi ilt at meta um, men óivað hevur dagsformurin alt at siga, tí liðini hava fleiri ferðir vunnið rættiliga greitt á hvørjum øðrum. Fyrst vann Stjørnan úti 21-19 og heima 34-24, og síðani vann Tjaldur úti 22-17 og heima 35-29.

Eftir stendur so spurningurin, um royndirnar hjá Stjørnuni verða drúgvari enn tað nýggja hjá Tjaldri, sum framvegis tykist vera undir uppbygging. Tað vita vit annaðhvørt longu páskaaftan ella ikki fyrr enn annan páskadag, og í øllum førum eru tey sera spent í bæði Klaksvík og Runavík.



*Seinast liðini spældu, vann Tjaldur tryggan sigur í Runavík. Stjørnan hevur tó eisini sínar sigrar at vísa á, og tí tykist talan vera um eina púrasta opna finalu í kvinnuhondbólti*

*Savnsmynd/Álvur Haraldsen*

## Dystir um páskirnar

### Sunset-finalur

| | | |
|---|---|---|
| 08/04 | Tjaldur-Stjørnan kl. 19.00 | Sámal/Kári |
| 11/04 | Stjørnan-Tjaldur kl. 15.00 | Eyðun/Andreas |
| 13/04 | Stjørnan-Tjaldur kl. 15.00 *) | |

**) Bert spæld, um einki er avgjørt*

### Atlantic Airways-finalur

| | | |
|---|---|---|
| 09/04 | VÍF-H71 kl. 14.30 | Eyðun/Andreas |
| 11/04 | H71-VÍF kl. 16.00 | Sámal/Kári |
| 13/04 | VÍF-H71 kl. 16.00 *) | |

**) Bert spæld, um einki er avgjørt*

### Løgmanssteypið

| | | |
|---|---|---|
| 09/04 | Víkingur-MB | Rúni Gaardbo |
| 09/04 | AB-B68 | Petur Reinert |
| 09/04 | FC Hoyvík-Undri FF | Alex Troleis |
| 09/04 | TB-B36 | Páll Augustinussen |
| 09/04 | KÍ-07 Vestur | Dagfinn Olsen |
| 09/04 | B71-ÍF | Eiler Rasmussen |
| 09/04 | HB-NSÍ | Georg Rasmussen |
| 09/04 | VB/Sumba-EB/Streymur | Lars Müller |

### Vodafonedeildin

| | | |
|---|---|---|
| 13/04 | HB-EB/Streymur | Dagfinn Olsen |
| 13/04 | ÍF-B36 | Rúni Gaardbo |
| 13/04 | KÍ-Víkingur | Páll Augustinussen |
| 13/04 | 07 Vestur-NSÍ | Georg Rasmussen |
| 13/04 | B68-AB | Lars Müller |

### 1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 13/04 | VB/S-Víkingur | Andrew Christiansen |
| 13/04 | HB-TB | Bárur Mortensen |
| 13/04 | B68-Skála | Rói Jacobsen |
| 13/04 | FC Hoyvík-B71 | Alex Troleis |
| 13/04 | MB-NSÍ | Birgir Sondum |

### 2. deild men

| | | |
|---|---|---|
| 11/04 | AB-07 Vestur | Pætur Albinus |
| 11/04 | B36-Undri | Eugen Voda |
| 11/04 | B71-TB | Jóhan P. Michelsen |
| 11/04 | EB/S-KÍ | Jóannes Mikkelsen |
| 11/04 | Víkingur-ÍF | Karl M. Poulsen |

# Finaludómararnir settir

**Tað verða Kári Hansen/Sámal Paulason og Eyðun Samuelsen/Andreas F. Hansen, sum skulu døma tær fýra hondbóltsfinalurnar um páskirnar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hondbóltssambandið hevur boðað frá, hvussu dómaraásetingarnar til tær fýra hondbóltsfinalurnar verða.

Í annaðkvøld døma Sámal Paulason og Kári Hansen kvinnudystin í Runavík millum Tjaldur og Stjørnuna, og hóskvøldið blása Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen í floytirnar, tá VÍF og H71 spæla fyrstu mansfinaluna í Vestmanna.

Leygardagin eru bæði hallirnar og dómararnir býtt um. Tá døma Sámal og Kári mansfinaluna í Hoyvík, meðan Eyðun og Andreas døma í Klaksvík.

Vinna liðini hvør sín dyst, verður neyðugt við einum triðja finaludysti, men enn er so eingin dómaraáseting gjørd fyri hetta. Tað er tó væl hugsandi, at tað verða Eyðun og Andreas, sum stýra floytuni, um tað bert verður neyðugt við nýggjari finalu í aðrari uppgerðini. Og at tað síðani verða boð eftir Sámal og Kára, um neyðugt verður við trimum dystum í báðum finalunum.